# Bíblian innblást av Gudi - ikki mannaorð um Gud

RICHARD DANIELSEN



**Nítjandi partur**

Seinast sóu vit, hvussu tað gongur út og hevur gingið út, sum Harrin hevur talað við profetunum. Hetta, at Harrin sendi fólk sítt í útlegd til allar tjóðirnar, men at hann nú leiðir tey heimaftur, júst sum hann hevur lovað við profetum sínum. Í tí brotinum kom Ezekiel eitt sindur inn á heidningatjóðirnar. Men Ezekiel kemur eisini, eins og hinir báðir, vit hava nevnt, nógv inn á heidningatjóðirnar. Eins og hinir talar hann dóm yvir tær. Í tríatiáttanda og tríatinýggjunda kapitli lýsir Harrin ein ræðuligan dóm yvir Gog og tjóðirnar, sum eru við honum. Har sigur hann, at eftir at Ísrael er komið aftur til landið, skulu hesar tjóðir leypa á teir, men Harrin grípur tá inn og frelsir Ísrael og heldur ein alvorligan dóm yvir heidningatjóðunum.

Í tjúguáttanda kapitli stendur hetta: So sigur Harrin HARRIN: Táið Eg savni hús Ísraels frá tjóðunum, sum tey eru spjadd ímillum, skal Eg fyri eygum tjóðanna lata síggjast á teimum, at Eg eri heilagur, og tey skulu búgva í landi sínum, tí, sum Eg gav Jákupi, tænara Mínum.

Tey skulu búgva trygt har og byggja hús og planta víngarðar – tey skulu búgva trygt, meðan Eg haldi dóm yvir øllum teimum, ið rundan um tey búgva, og sum vanvirða tey – og tey skulu sanna, at Eg, HARRIN, eri Gud teirra. Ez. 28,25-26.

Tað eru fleiri kapitlar í Ezekiel, sum siga frá um dómin, sum skal koma yvir tjóðirnar. Les kapitlarnar 25 til 35. Sumt av hesum er longu gingið út. Fleiri av profetunum tala um "dag Harrans", sum er ein dómsdagur yvir henda heim. Ezekiel sigur soleiðis:

Orð HARRANS kom til mín; Hann segði: Menniskjasonur! Profetera og sig: So sigur Harrin HARRIN: Venið tykkum: „Vei – tann dagur!" Tí nær er dagurin, ja, nær er dagur HARRANS; dagur við skýggjum, dómstíð skal hann vera tjóðunum. Ez. 30,1-3.

Dómur bíðar heiminum, nú ið Harrin er byrjaður, at lata tað ganga út, sum profetarnir hava talað um frelsu Ísraels á seinastu døgum. Hetta eru profetarnir samdir um. Eg havi eftir førimuni tikið nakað fram av tí, sum Esaias, Jeremias og Ezekiel siga um hetta.

Tað, sum nú stendur frammanfyri er at Jesus Kristus, Ísraels Messias, skal koma aftur. Hann kemur niður í luftina eina løtu, vit kanska ikki høvdu vænta, og rykkir samkomu sína upp til sín. Hygg Ápostlasøgan 1. kapitul 9. til 11. vers. Og 1. tessalonikabræv 4. kap. 13. til 18. vers. Hann kemur eisini niður á jørðina, niður á oljufjallið, at frelsa Ísrael. Hygg Zakarias 14. kap. 1. til 5. vers. Her standa stórar og álvarsamar hendingar fyri framman. Nú er ikki at sova. Men gera eftir ráðum Jesusar: Tað, sum eg sigi við tykkum, sigi eg við øll: Vakið! Hoyrir tú til samkomu Guds? Verður tú við í skaranum, sum verður ryktur upp í luftina at møta Jesusi? Eg spyrji ikki, um tú hoyrir til "brøðrasamkomuna", fólkakirkjuna, hvítusunnufólk ella okkurt annað. Men hoyrir tú til samkomu Guds, ert tú frelstur, hevur tú vent við frá tí skeivu leið, sum bæði tú og eg hava gingið frá barni av. Eru syndir tínar fyrigivnar?

Vit hava nú hugt at, hvat profetarnir siga um dómin yvir hendan heim. Jesus sigur tað soleiðis hjá Markusi:

Tann, ið trýr og verður doyptur, skal verða frelstur; men tann, ið ikki trýr, skal verða fordømdur. Mark. 16,16.

Næstu ferð fara vit í Dánielsbók.

**Framhald**

# Kommunustjórin í Tórshavnar kommunu skrivar, at Dimmalætting ber skeivan boðskap

HØGNI MIKKELSEN
býráðslimur



Ì lesarabrævi tann 22. februar 2007 skrivar Jens Marius Poulsen, kommunustjóri, at blaðmaðurin á Dimmalætting, Heini Gaard, ber skeivan boðskap um keypið av skrivstovubygningninum við Fr. Petersensgøtu.

Men eg spyrji bara, segði kommunustjórin satt ella ósatt, tá hann upplýsti fíggjarnevndini, at tað kom at kosta 200-300 túsund krónur so at bygningurin var klárur at taka í brúk hjá kommununi.

Á fíggjarnevndarfundi tann 18. apríl 2007 varð eitt av málunum, um kommunan skuldi keypa ella leiga skrivstovu bygningin við Fr. Petersensgøtu.

Kommunustjórin, Jens Marius Poulsen segði tá, at hølisviðurskiftini hjá umsitingini vóru út av lagi vánalig, og at málið, um at keypa bygningin við Fr. Petersensgøtu hevði stóran skund. Ein meiriluti í fíggjarnevndini mælti tí býráðnum til at keypa bygningin fyri 7. mill. krónir. Tann 23. apríl kom málið fyri býráðið, har keypið varð einmælt samtykt - tíverri.

Grundin til at bygningurin varð keyptur, var tí at kommunustjórin segði, at tað kostaði ca. 200-300 túsund krónur at fríska byggningin upp, so at hann var klárur at taka í brúk. Hann segði eisini, at keypi hevði skund, tí tronga støðan í býráðnum var katastrofal. Tað er nú eitt ár síðani, og enn er byggningurin ikki tikin í brúk.

Eyka fíggjarnevndarfundur var tann 1. februar 2008, har biðið bleiv um knappar 3. mill. Krónur til at gera byggningin kláran. Nú var kostnaðurin 10 ferðir meir enn hvat kommunustjórin hevði upplýst fyri fíggjarnevndini.

Kommunustjórin skrivar eisini í lesarabrævinum, at ongir pengar eru brúktir til at ummvæla byggningin. Tað er rætt, men hann gloymir at skriva, at kommunan hevur brúkt um 100 túsund krónur til at gera eitt projekt til ummvæling av húsinum, eitt prosjekt, sum fíggjarnevndin ikki hevði biðið um.

Seinast í brævinum skrivar kommunustjórin: "tað stendur einum hvørjum greitt, eisini býráðslimum, at skulu høli, sum flutt verða úr, takast aftur í nýtslu, er neyðugt við ávísum ábótum".

Tað vita allir býráðslimir, men tá kommunustjórin, við einari stórari ummsiting undir sær, sigur at tað er nokk at brúka 2-300 túsund krónur til ummvælingina, so tóku býráðslimir tað fyri góða vøru, men so varð ikki.

# Politiska minnið er stutt

HELGI ABRAHAMSEN



**Politiska minnið er ofta rættiliga stutt, og onkuntíð kann tí vera neyðugt at fríska tað eitt sindur upp**

Karsten Hansen, landsstýrismaður í fíggjarmálum, hevur boðað frá, at fíggjarlógaruppskotið fyri 2008 verður lagt fyri tingið í hesi vikuni, men løgtingsformaðurin hevur avgjørt, at eingin tingfundur verður hesa vikuna, so uppskotið kann ikki leggjast fram fyrr enn í fyrsta lagið komandi týsdag. Løgtingsval var 19. januar og samgonguskjalið var undirskrivað 2. februar.

Fyri fýra árum síðani var løgtingsval tann 20. januar og samgonguskjal undirskrivað 31. januar. Táverandi fíggjarmálaráðharri legði sítt fyrsta uppskot til fíggjarlóg fyri tingið tann 25. mars.

Karsten Hansen hevur sostatt havt tríggjar vikur longri um at gera hetta uppskotið, enn Bárður Nielsen hevði um sítt uppskot fyri fýra árum síðani, men hóast hetta, so hevur Karsten Hansen fingið góðan arbeiðsfrið – serliga um vit samanbera við, hvussu andstøðan í 2004 leikaði í, tí Bárður Nielsen arbeiddi ov seint. Millum annað vóru hesar atfinningarnar alment frammi tá:

"Tað er ein vanlukka fyri samfelagið, at vit framvegis ikki hava nakra fíggjarlóg fyri 2004, sigur Karsten Hansen, fyrrverandi landsstýrismaður í fíggjarmálum."
*(Sosialurin 5. mars 2004)*

"Tá ið undanfarni løgmaður valdi at skriva val út og at senda fíggjarmálaráðharran til hús, legði hann landið í stjórnarloysi og landskassan í ongamannaland."
*(Høgni Hoydal í blaðgrein 8. mars 2004)*

"Fyri hvønn dag, ið gongur, so fossar peningur úr landskassanum."
*(Høgni Hoydal í blaðgrein 8. mars 2004)*

"Nú byrjar tíðin at ganga undan"
*(Bill Justinussen í løgtinginum 10. mars 2004)*

"Samfelagið hevur reelt ligið uttan stýring síðan fyrst í desember mánað, og tað er sera óheppið.
*(Karsten Hansen í samrøðu við Sosialin 5. mars 2004)*

Um støðan var so álvarsom áðrenn 10. mars 2004, so veit eg ikki hvat vit skulu siga um 15. apríl 2008.

Men alt hevur sína orsøk. Í desember 2003 legði táverandi landsstýri frá sær, beint áðrenn botnlinjutølini á fíggjarlógini gjørdust reyð. Tí var tað sera umráðandi hjá teimum flokkunum at fáa tveitt alla fíggjarliga ábyrgd yvir á tað eftirfylgjandi landsstýrið. Undirskotið skuldi einki hava við teirra politikk at gera, nei tað var vantandi stýring frá 5. desember 2003 til 25. mars 2004, sum var altavgerandi.

Men nú hevur tað eftir øllum at døma einki at siga fyri somu flokkar, um tíðin dregur út, tí minni hjá veljarunum er so vælsignað stutt.

# Lógir RSF ein bági fyri kappróðurin...

ÁRNI ANDREASEN



Nú nógv hevur verið tosað um at tað er so trupult at manna kappróðrarbátarnar, er ongin ivi um, at lógirnar sum í dag eru galdandi hava negativa ávirkan, tá báturin skal mannast. Her hugsi eg um, at bátur skal lutaka í minsta lagi tríggjar fm-stevnur fyri at kunna lutaka í kappróðri á Ólavsøku.

Tað er onki at taka seg aftur í, at nógv fleiri bátar vóru mannaðir, um reglurnar vóru sum fyrr. Tá kundi bátur verða mannaður/flotaður ein kanska tveir mánaðir undan Ólavsøku og hettar hevði við sær at kappingin bleiv størri og betri sum leið út ímóti Ólavsøku.

Gleðin var stór hjá teimum, sum mannaðu bát mitt í kappingini og somuleiðis høvdu sjófólk/útisetar og fólk her á landi møguleika at gera dreymin til veruleika, og sjálvsagt hevði áskoðarafjøldin vaksið, tá hevði avvarandi hjá hesum "óvandu" rógvarum leitað sær oman at støðnni.

Hesir "óvandu" høvdu brúk fyri einari kanska tveimum "test" stevnum áðrenn finaludagin á Ólavsøku soleiðis at so kundi rættast upp á ymsar skeivleikar umborð á bátinum, og hesar royndarstevnur høvdu somuleiðis drigið avvarandi við sær, og sostatt vaksið um inntøkurnar á stevnunum uttan fyri Havnina.

Sum lógin er í dag, kunnu øll lutaka í fm-róðri á øllum stevnum uttan í Havn. Eg veit at hendan lógin var gjørd, tí at fm-úrslitið kundi broytast um avgerandi róðurin um fm-heitið var á Ólavsøku, og so kom ein bátur mitt í árinum og broytti fm-úrslitið soleiðis, at heilt aðrir bátar kundu gerast meistarar osv. Halló... er man veruliga best, tá man tapir ímóti bátum sum hava vant meira enn helvtina styttri og bert róð eina ella tvær stevnur????

**Vaksnamannabátarnir**
Trupulleikin er at manna vaksnamannabátarnar. Sostatt skuldi tað veri frítt at lutikið í kappróðri fyri 6-manna, 8-manna og 10-mannaførini og ikki veri nøkur lóg sum beindi fyri kappróðrinum í hesum bátastøddum.

Tað hevði verið til stóra gleði fyri øll vaksin kapp-róðrarfólk og ikki minst fyri teir sum rógva allar stevnurnar og sum eru væl trimmaðir í rógvimaskinunum tá kundu vit sæð um teir "maskintrenaðu" roynast so nógv betur enn hin náttúrliga megin sum Várharra gav okkum.

Somuleiðis hevði "mytan" rógvimaskinur staði sína roynd,vit vita jú at tær "gomlu" tíðirnar vóru ikki verri enn í dag, ja, onkuntíð betur og tá var venjingin annan hvønn dag ella sum tað nú einaferð lá fyri og sostatt hevði ein tíð til familjuna og ikki sum nú at 6-8 mánaðir fara til venjing/fyrireiking.

Vælsignaðir tit í RSF og feløg kring landið, hugsið um tað, tí at hettar er í tøkum tíma. Roynið og broytið lógina til komandi aðalfundin 2008 og gevið soleiðis øllum gleðina aftur við at síggja so nógvar kappróðrabátar á firðum og vágum sum gjørligt og tá síggja vit aftur føroyskan kappróður blóma.

Við vón um at besti bátur vinnur!!!!

Við vón um eitt gott kappróðrarár.